**AGANEVNDIN**

KÆRA 2/2013

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Giza/Hoyvík kærir FC Suðuroy fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 25.05.2013 | Aganevndin móttikið kæru: 13. juni 2013 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

## 1. Úrskurður

**Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.**

**Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður FC Suðuroy 2. deild menn dømt at tapa dystin móti Giza/Hoyvík tann 25. mai 2013 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.**

## 2. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

Giza/Hoyvík hevur kært FC Suðuroy fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum Giza/Hoyvík og FC Suðuroy í 2. deild hjá monnum tann 25. mai 2013.

Í kæruni vísir Giza/Hoyvík á, at FC Suðuroy hevur nýtt leikaran Oddur Joensen, sum ikki er skrásettur sum leikari hjá FC Suðuroy.

FC Suðuroy er hoyrt í málinum og viðgongur, at leikarin av misgávum ongantíð er skrásettur í FC Suðuroy, hóast hann ikki hevur leikt í øðrum felag.

## 3. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2 í Agareglugerðini, sbr. grein 5, stk. 3 og 4, og sbr. grein 7, kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 4 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 3 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 4. Fakta í málinum

Tann 25. mai 2013 varð dystur leiktur millum Giza/Hoyvík og FC Suðuroy í 2. deild hjá monnum.

Sambært dómaraseðlinum leikti Oddur Joensen fyri FC Suðuroy í omanfyri nevnda dysti.

Sambært upplýsingum frá FSF skrivstovuni er nevndi leikari ikki skrásettur sum leikari hjá FC Suðuroy.

AGANEVNDIN

| |
|---|
| **5. Lógarverkið** |
| Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt er leikari lógligur, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF' ella tá loyvisbræv er útskrivað. |
| **6. Staðfestingar, metingar, o.t.** |
| Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki sbr. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt er leikari lógligur, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF' ella tá loyvisbræv er útskrivað. |
| **7. Niðurstøða** |
| Leikarin Oddur Joensen leikti ólógliga í dystinum millum Giza/Hoyvík og FC Suðuroy tann 25. mai 2013 í 2. deild hjá monnum sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.<br><br>Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikara verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.<br>Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum. |
| **8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.** |
| Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum. |
| **9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:** |
| **Tórshavn 13. juni 2013**<br><br>____________________<br>Ingunn Ó. Eiriksdóttir, forkvinna<br>Aganevndin |
| **Aganevnd FSF's** |